Leiðari á bretskum umhvørvisfelagsskapi:

# - Føroyska ferðavinnan út av lagi vánalig

**- Hetta er fyrstu ferð, eg eri í Føroyum, og sum ferðafólk havi eg ongantíð upplivað so vánaliga viðferð, sigur Nigel Hughes, leiðarin í bretska umhvørvisfelagsskapinum Green Light Trust, sum hevur 50.000 limir kring allan heim. Fríggjadagin kom hann til Føroya at uppliva náttúru okkara á ferð, sum hann hevði samskipað við Smyril Line**

FERÐAVINNA
*Heini í Skorini*



*Bretski umhvørvismaðurin, Nigel Hughes, var alt annað enn nøgdur við tænastustøði hjá Smyril Line. - Eg havi ongantíð upplivað ferðavinnu á so lágum støði, sigur grøni aktivisturin úr Onglandi, sum er leiðari á umhvørvisfelagsskapi við 50.000 limum*

Saman við fimtan øðrum ferðafólkum, sum tó ikki vóru í ferðalagi saman, stóð Nigel Hughes saman við vinmanni sínum fríggamorgunin uppi á Hotel Føroyum uttan at vita, hvat hann skuldi gera. Eftir at hava verið í Íslandi við samstarvsfelaga sínum í bretska umhvørvisfelagsskapinum Green Light Trust, var Nigel Hughes komin til Føroya at hyggja nærri at náttúru okkara, og allur túrurin var fyrireikaður í samstarvi við Smyril Line, ið sum kunnugt eigur bæði Nørrona og Hotel Føroyar. Men alt gekk sambært ónøgda ferðamanninum ikki sum ætlað.

### Níggju tíma bíðitíð

Nigel Hughes sigur frá, at Norrøna legði at kl. 5 um morgunin, og at øll skuldu vera úr kømrunum kl. 3.30 uttan at fáa morgunmat umborð.

- Eftir at hava leitað í hálvan tíma fáa vit ein hýruvogn at koyra okkum niðan á Hotel Føroya kl. 5.30, men uppi á Hotel Føroyum verður í eini kaldari móttøku sagt, at vit ikki sleppa inn á kømur okkara fyrr enn kl. 14 og hvørki fáa mat ella drekka fyrrenn kl. 6.30, greiðir ein ónøgdur Nigel Hughes frá. Hann sigur, at á henda hátt var bíðitíð teirra níggju tímar, áðrenn ein kærkomin song var tøk, og at tey fimtan ferðafólkini uppi á Hotel Føroyum fríggamorgunin hvørki vistu út ella inn.

- Tá allur túrurin frammanundan er goldin og samskipaður í samráð við Smyril Line, og tá talan er um eitt fýra stjørnað hotel, vænta vit góða tænastu og samskipan, men vit vórðu snøgt sagt hildin fyri gjøldur, sigur Nigel Hughes.

Grøni aktivisturin vísir víðari á, at hóast hann hevur ferðast kring allan heim í umhvørvisørindum við felagsskapi sínum, hevur hann ikki verið vitni til ferðavinnu á so lágum støði sum í Føroyum.

### Út av lagi samskipan hjá Smyril Line

Langa bíðitíðin hevði sambært Nigel Hughes havt eina náttúrliga orsøk, um Nørrona og Hotel Føroyar vóru sjálvstøðug og skyld at hvørjum øðrum, men sum kunnugt er bæði hotellið og ferðamannaskipið ogn hjá Smyril Line.

- Tá ferðafólk hvønn fríggjadag og mánadag koma til landið kl. 5 um morgunin og ikki sleppa inn á kømur síni fyrrenn kl. 14, er talan í veruleikanum um út av lagi samskipan hjá Smyril Line, sigur Nigel Hughes. Hann sigur, at ferðamaðurin, sum hevur goldið í dýrum dómum, als ikki fær ta tænastu, hann væntar.

- Umframt, at vit hvørki fingu innivist ella mat og drekka, var móttøka okkara sera køld, og gjørdu vit vart við ónøgd okkara, vórðu vit kensluleyst uttan gestablídni víst frá okkum, er niðurstøða Nigel Hughes, leiðari á bretska umhvørvisfelagsskapinum við heili 50.000 limum.

Eftir at hava gjørt vart við ónøgd sína fríggjamorgunin, fekk hann allan peningin aftur frá Hotel Føroyum, sum eisini syrgdi at útvega honum eitt kamar á Hotel Tórshavn.

Hetta er fyrsta ferðin, at Nigel Hughes er í Føroyum at uppliva náttúru okkara, men eftir viðmerkingum hansara um túrin er ivasamt, um vit síggja bretska umhvørvismannin aftur á klettunum…

# - Starvsfólk okkara kendu seg hótt

**Stjórin á Hotel Føroyum, Johannes Jensen, heldur talan vera um ósakligan atburð frá bretska umhvørvismanninum fríggjamorgunin á Hotel Føroyum. - Starvsfólk okkara kendu seg hótt, og maðurin fór út um vanligt mark, sigur Johannes Jensen**

FERÐAVINNA
*Heini í Skorini*

Í rapportini, sum náttarvakturin á Hotel Føroyum lat stjóranum fríggjadagin, stóð at lesa, at ongantíð áður hevði hann upplivað slíkan atburð hjá ferðafólki á Hotel Føroyum. Bretski umhvørvismaðurin, Nigel Hughes, var sambært stjóranum á Hotel Føroyum so sintur, at hann hótti at bróta lutir og gera seg inn á starvsfólk.

- Eins og náttarvaktur okkara skrivaði, havi heldur ikki eg upplivað slíkan atburð, sigur Johannes Jensen. Hann vísir á, at bretin kom ovursintur inn á skrivstovurnar handan reseptiónina á Hotel Føroyum, og at starvsfólkini av álvara kendu seg hótt av ágangandi atburðinum.

### Altjóða støði

Stjórin á Hotel Føroyum, Johannes Jensen, sigur, at altjóða støði fyri check-in tíð er kl. 14, meðan somu reglur áseta, at fólk skulu vera úti kl. 12.

- Hotellið var fult, ferðafólk okkara lógu í fasta svøvni, og so krevur Nigel Hughes eitt kamar kl. 5.30 um morgunin, sum vit sjálvsagt ikki kunnu eftirlíka, sigur Johannes Jensen.

Hann vísir á, at talan er um vanliga mannagongd á altjóða støði, og at Hotel Føroyar vanliga ongan trupulleika hevur av bíðitíðini hjá ferðafólkunum frá tí, at Nørrona leggur at kl. 5, til kømur eru tøk kl. 14.

### Eingin trupulleiki

Hóast ferðafólk hvønn fríggjadag og mánadag koma á hotellið tíðliga um morgunin, áðrenn kømur eru tøk, er sambært Johannes Jensen ongantíð ónøgdsemi.

- Tey verða upplýst um hesi viðurskifti áðrenn tey koma til Føroya, morgunmatur er kl. 6.30 og vit hava eitt bagagurúm til øll ferðafólk, sigur stjórin á Hotel Føroyum. Hann vísir víðari á, at ferðafólk sjálvsagt ikki koma til Føroya at sita á kamarinum ella í eini lobby á Hotel Føroyum, og at tey tískil vanliga fara beina leið av aftur hotellinum um morgnarnar til fyrireikaðar túrar og tílíkt.

- Tískil var talan um eitt serligt fyribrigdi fríggjamorgunin, har maðurin fór út um øll saklig mørk, slær Johannes Jensen fast.

Hann vísir á, at ónøgdsemi ongantíð hevur verið millum kundarnar gjøgnum summarið, og at umhvørvismaðurin Nigel Hughes fekk allan peningin aftur og nýtt kamar á Hotel Tórshavn.

# - Vanlig mannagongd

**Áki Jespersen, leiðari á ferðamannadeildini hjá Smyril Line, sigur um tilburðin á Hotel Føroyum, at talan í veruleikanum als ikki er um nakran trupulleika. - Ongastaðni í heiminum sleppur tú inn á eitt kamar kl. 5 um morgunin, um hotellið er fult**

FERÐAVINNA
*Heini í Skorini*

Hóast bretski umhvørvismaðurin hevur gjørt vart við ónøgd sína á Smyril Line, er talan sambært Áka Jespersen, leiðara á ferðamannadeildini, als ikki um nakran trupulleika ella orsøk til ónøgd.

- Kring allan heim er vanlig mannagongd, at tú sleppur inn kl. 14, um hotellið er fult, sum tað oftast er á sumri, sigur Áki Jespersen.

Hann vísir á, at tá kømur verða vaskað og fólk liggja og sova, ber sjálvsagt ikki til at loyva ferðafólki inn so tíðliga.

- Ongastaðni í heiminum sleppur tú inn á eitt kamar kl. 5 um morgunin, so klagurnar frá umhvørvismanninum eru uttan orsøk og grundgeving, eru stuttu og ítøkiligu viðmerkingarnar hjá Áki Jespersen, leiðara á ferðamannadeildini á Smyril Line.



# Meistarligt undirhald

**– Ósemjan í samgonguni er ein meistarligur sjónleikur, har roynt verður at venda eyguni frá veruligu trupulleikunum og at tiga andstøðua í hel, heldur Jóannes Eidesgaard**

SJÓNLEIKUR
*Áki Bertholdsen*



*–Tað, sum fer fram í løtuni, er ein sjónleikur, sum samgongan førir fram, tí hon vil ikki viðgera teir veruligu trupulleikarnar. Men hetta er meistarligt undirhald, heldur Jóannes Eidesgaard*

– Hetta er tann beri sjónleikur. Men handritið er meistarligt.

Jóannes Eidesgaard heldur ikki, at ósemjurnar, sum dag og dagliga koma til sjóndar fyri almenninginum, hava nakað sum helst upp á seg.

Seinastu tíðina, hava limir í samgonguni fleiri ferðir verið í hornatøkum um ymisk mál. Eitt mál var sjómansskatturin, so var tað norðoyatunnilin, so var tað serliga samferðslugjalldið og nú er tað arbeiðsmarknaðaruppskotini hjá Bjarna Djurholm.

– Hetta eru ikki veruligar ósemjur sigur hann. Hetta er tað bera undirhald. Men hetta er undirhald á seta høgum støði, leggur hann afturat.

Formaðurin í javnaðarflokkinum heldur, at uttan iva eru handritini til hendan glæntrileikin skrivað á onkrari ráðharrastovu í Tinganesi.

### Endamálið er rokkið

Hann sigur, at við hesum sjónleiki hevur tað eydnast samgonguni at fingið alt kjakið í samfelagnum at snúgva seg um tær sokallaðu ósemjurnar í samgonguni.

Og vit mugu eisini ásanna, at hesin sjónleikurin er meistarliga væl leikstjórnaður, tí endamálið kundi ikki verðið betri rokkið.

– Hann heldur, at hetta tænir tveimum endamálum:

– Í fyrstu syftu er hetta ein roynd at venda eyguni hjá fólki frá veruligu trupulleikunum. Í øðrum lagi er hetta ein roynd at tiga andstøðuna í hel – og somuleiðis teir báðar smáu samgonguflokkarnir, tí alt hetta eru ósemjur ímillum fólkaflokkin og tjóðveldisflokkin og teir báðir smáu flokkarnir sleppa heldur ikki upp í part.

Jóannes Eidesghaard sigur, at úrslitið er, at ein sokallað ósemja ímillum tjóðveldisflokkin og fólkaflokkin stjelur allar yvirskriftirnar í fjølmðlunum.

– At sjálvur løgmaður ikki letst um vón er besta prógvið um, at ósemjan ikki eru verilig, men bara ein politiskur glæntrileikur. Løgmaður veit, at talan er ikki um veruligar ósemjur um ymisk politisk mál og tí heldur hann seg kúrran.

– Hevði talan verið um stjórnarkreppur, hevði løgmaður neyvan verið tann tigandi eygleiðarin, hann hevur verið, tí so hevði hann talað at.

### Fjalir útyvir stórar trupulleikar

Jóannes Eidesgaard sigur at tað hevur gingið avbera væl í Føroyum í nøkur ár, men nú er alt, sum bendir á, at tað aftur fer at ganga ímóti og samgongan stendur fyri ómetaliga truplum tíðum.

– Fiskaprísirnir eru lækkaðir, alivinnan er í svárari kreppu og búskaparligi vøksturin er lækkaður. Tí er tað greitt, at samgongan stendur fyri ómetaliga truplum tíðum, ikki minst nú fíggjarlógin fyri komandi ár skal leggjast og tað er í veruleikanum ikki fyrrenn nú, at samgongan skal standa sína sveinaroynd.

– Men alt hetta verður ikki tikið upp á tungu. Ístaðin verður sjónleikir framførdir um sokallaðar ósemjur fyri at venda eyguni frá veruligu trupulleikunum.

– Men eg má viðganga, at tað er genialt, so væl hesin sjónleikurin er lagur til rættis, heldur formaðurin í javnaðarflokkinum.

### Hava havt mótspæl

Nú er andstøðan oftani skuldsett fyri at vera óvirkin og fyri ikki at hava nakað politiskt mótspæl til samgonguna. Er hetta, tú sigur, ikki bara gor og gall frá einum floksformanni, sum er í døpurhuga tí at hann ikki sleppur upp í part?

– Slíkar atfinningar havi eg sæð og hoyrt og tær mugu vit taka til okkum. Og í ein vissan mun má eg eisini taka undir við teimum. Men bara í ein vissan mun, tí ongin kann siga, at javnaðarflokkurin ikki hevur givið samgonguni politiskt mótspæl í teimum málunum, sum hava verið frammi. Vit hava verið virkin í sjálvstýrismálinum, vit hava víst á grundleggjandi viðurskifti í høvuðsvinnuni, eitt nú hava vit roynt at viðgera trupulleikan við at leggja fiskiloyvi saman, eins og vit hava víst á onnur, grundleggjandi viðurskifti í høvðusvinnuni og vit hava roynt at fáa gongd á eina viðgerð um at einskilja almennar fyritøkur. Sostatt hava vit víst á eina røð av viðurskiftum, men tað hevur alt verið til fánýtis, tí samgongan vendir eyguni frá teimum.

– Men nú er tað eisini uppgávan hjá samgonguni at royna at gera andstøðuna til einkis, leggur Jóannes Eidesgaard afturat.

Stóra avbjóðingin hjá Bjarna:

# Djurholm verður at finna semju

**– Ætlar samgongan at kroysta eina skipan niðuryvir høvdið á pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, er tað deyðadømt, sigur Jóannes Eidesgaard**

ARBEIÐSMARKNAÐURIN
*Áki Bertholdsen*

– Vit góðtaka undir ongum umstøðum, at ein skipan verður kroyst niðuryvir høvdið á pørtunum á arbeiðsmarknaðinum, uttan at teir taka undir við tí.

Tað sigur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins.

Javnaðarflokkurin er í andstøðu og vit hava spurt hann, hvat hann heldur um ætlanina hjá samgonguni at gera eina nýggja skipan fyri arbeiðsmarknaðin, har endamálið er at fáa betri skil á, so at vit sleppa undan arbeiðssteðgum í tíð og úrtíð.

Ein partur av hesi ætlan er at ætlanin at skipa ein víðkaðan gerðarrætt, sum skjótt skal kunna taka avgerðir um ósemjur um sáttmálan.

Fakfeløgini eru hart ímóti hesum, tí tey kalla hetta fyri ein arbeiðsrætt, saman hvussu tað verður nevnt og tað vilja tey ikki vita av.

Ein annar partur av hesi ætlan er at geva semingsmonnunum víðkaðar heimildir at útseta verkføll og tað vilja fakfeløgini heldur ikki góðtaka.

### Deyðadømt

Jóannes Eidesgaard sigur, at tað tænir landsstýrismanninum í arbeiðsmarknaðarmálum til rós, at hann eisini hevur sent andstøðini uppskotið um nýggja skipan fyri arbeiðsmarknaðin til kunningar.

Javnaðarflokkurin er ikki liðugur at viðgera uppskotið.

Tí kann hann heldur ikki viðgera smálutir í uppskotinum.

– Men eg kann kortini siga so mikið sum tað, at javnaðarflokkurin fer ongantíð at góðtaka, at ein skipan verður kroyst niðuryvir partarnar á arbeiðsmarknaðinum, sum teir ikki taka undir við.

– Ætlar samgongan tað, er tað longu deyðadømt frammanundan, sigur formaður javnaðarfloksins.

Hann sigur, at tí noyðist Bjarni Djurholm at taka í egnan barm og at taka uppskotið aftur og at byrja av nýggjum, har hann leggur arbeiðið til rættis í samstarvi við partarnar á arbeiðsmarknaðinum.

Hann tekur annars undir við Bjarni Djurholm, tá ið landsstýrismaðurin vísir á, hvussu arbeiðsmarknaðurin er skipaður í hinum norðanlondunum.

Í grannalondum okkara er talan um skipanir, sum eru gjørdar í samráð við partarnar á arbeiðsmarknaðinum, tí rigga tær.

– Men hetta eru samstundis skipanir, sum tey í hinum Norðanlondunum hava brúkt fleiri ártíggjur um at bygt teirra skipanir á arbeiðsmarknaðinum upp.

– Tær eru ikki gjørd ar einum høggi. Og tað er heldur ongin, sum sigur, at ein fullfíggjað skipan fyri okkara arbeiðsmarknað skal gerast í einum høggi heldur. Tað kann væl vera, at vit ikki røkka so langt í fyrsta umfari, men so er at taka tað, sum semja fæst um í hesum umfari og so er at royna at taka næsta stigið eina aðru ferð.

### Stóra avbjóðingin hjá Bjarna

Formaður javnaðarfloksins veit, at tað kan vera trupult at fáa partarnar á arbeiðsmarknaðinum at semjast um nakað so grundleggjandi sum eina nýggja skipan fyri teirra viðurskifti, tí teir eru mestsum av sær sjálvum ósamdir um mestsum alt.

– Men júst tað at fáa partarnar at semjast, verður tann tann heilt stóra avbjóðingin hjá landsstýrismanninum. Tað er eitt ógvuliga trupult talv at telva, men tað er júst í einum føri sum hesum, at Bjarni Djurholm skal vísa, hvør dugur er í honum.

Og formaður javnaðarfloksins heldur, at gróðrarbotnurin fyri at fáa samráðingar í lag við feløgini á arbeiðsmarknaðinum, skuldi verið rættiliga væl tæðaður.

– Allir partar eru samdir um, at vit eiga at fáa eina nýggja skipan og tað er altíð eitt gott støði at fara undir samráðingar á. Men tað er greitt, at tað er neyðugt at fara fram við størsta varsemi, sigur Jóannes Eidesgaard.

Hann veit eisini væl, at tað kann vera trupult at fáa allar partar at semjast um allar smálutir í eini nýggjari skipan.

– Men tað kann ikki koma uppá tal at seta eina skipan í verk, ið teir ikki sum heild taka undir við. Tað einasta, sum betongdiplomati førir við sær, er, at alt fer í baklás og tá er onki vunnið, sigur Jóannes Eidesgaard.



*– Hetta er eitt ógvuliga trupult talv hjá Bjarna Djurholm at telva, men tað er júst nú, at hann skal vísa, hvør dugur er í hinum, sigur Jóannes Eidesgaard*